# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Sjálvandi vil Frakland ikki hava kríggj við Iran, so okkara tilmælið er tingingar og afrtur tingingar*

*(Bernard Kouchner).*

# Givin at leita

**Løgreglan í amerikanska statinum Nevada er givin at leita eftir ævintýraranum Steve Fossett**

Tann 3. september fór tann kendi ævintýrarin og ríkmaðurin Steve Fossett við einum lítlum flogfari av einum flogvølli í Nevada. Hann ætlaði sær eina ferð út yvir Nevada-oyðimørkina og skuldi koma aftur um tríggjar tímar. Hann kom ikki aftur.

Síðani hava myndugleikarnir leitað, og onkran dag hava umleið 20 flogfør verið við í leitingini, men alt til fánýtis, og nú hevur løgreglan so steðgað leitingini.



*Steve Fossett setti fleiri heimsmet í luftini - bæði við flogførum og ballónum*



*Tjernobylvanlukkan í 1986 er tann ringasta av sínum slagi*

# Tjernobyl skal í stál

**Gamla kjarnorkuverkið í Tjernobyl skal hava ein kappa úr stáli**

Ukrainsku myndugleikarnir hava tikið av einum tilboði frá einari franskari fyritøku, sum hevur boðið sær til at gera ein stálkappa uttan um tað søguliga kjarnorkuverkið. Tað er neyðugt, tí tann gamli betongkappin er farin at lúta fyri tíðarinnar tonn.

- Endiliga kunnu vit vísa okkara egna og altjóða samfelagnum, at vit hava funnið eina loysn upp á trupulleikan við Tjernobyl, sigur ukrainski forsetin, Viktor Jushenko.

Arbeiðið at gera ein stálkappa uttan um tað gamla kjarnorkuverkið er mett at taka fimm ár, og tað eru útlendskir stuðlar, sum gjalda.

# Russland ávarar USA ímóti at leypa á Iran

**-Eitt amerikanskt álop á Iran hevði verið eitt politiskt mistak, sigur russiski varauttanríkisráðharrin**

-Vit eru sannførdir um, at tann iranski trupulleikin kann ikki loysast við hermegi. Tað letur seg ikki gera. Vit hava sæð, hvussu trupult tað er at loysa trupulleikarnar í Irak við hermegi, og spurningurin um Iran er uppaftur truplari, sigur Aleksander Losjukov við blaðið Vremja Novosti.

Hann sigur, at eitt hernaðarátak ímóti Iran fer at gera støðuna í Miðeystri uppaftur verri, enn hon er, og at eitt tílíkt átak fer at elva til stóra mótstøðu frá tí muslimska heiminum.

Um ein mánað hittast umboð fyri londini við Kaspiska Havið at umrøða ymisk viðurskifti av felags áhuga, og hesaferð verður fundurin í iranska høvuðsstaðnum Teheran.

- Eg veit ikki, um amerikanararnir ætla at bumba tann kaspiska fundin, men eg vænti ikki, tí tað hevði givið teimum álvarssamar trupullerikar, sigur Aleksander Losjukov við russiska blaðið.

George W. Bush, forseti, hevur fleiri ferðir hótt við hernaðaratgerðum ímóti Iran fyri at fáa landið at sleppa sínum kjarnorkuætlanum, men Samuel Bodman, orkumálaráðharri, segði í ST í gjár, at USA fer at royna at loysa trætuna við samráðingum. Tað sama segði Robert gates, uttanríkisráðharri, fyrradagin, men hann skoytti tó uppí, at allir møguleikar standa opnir.

## STUTT SAGT

### Ísrael vil tingast

Ísraelski forsætisráðharrin, Ehud Olmert, sigur nú, at hann er til reiðar at tingast við leiðararnar í Sýrialandi um eina friðaravtalu. Orð hansara koma bara nakrar fáar dagar eftir, at sýrisku myndugleikarnir løgdu ísraelsk flogfør undir at hava bumbað mál í Sýrialandi. Ehud Olmert sigur, at er Sýrisland sinnað at virka fyri friði millum tey bæði londini, er hann til reiðar at fara til samráðingarborðið uttan at leggja nakrar treytir við frammanundan.

### Fáa fornminni aftur

Lærdi, amerikanski háskúlin Yale er gingin við til at lata myndugleikunum í Peru fleiri túsund fornlutir, sum stava frá gamla inkaríkinum. Amerikanskir fornfrøðingar funnu lutirnar í inkahøvuðsstaðnum Machu Picchu í árunum frá 1911 til 1915. Talan er um umleið 4.000 stórar og smáar lutir. Myndugleikarnir í Peru kravdu at fáa lutirnar aftur og vístu á, at amerikanararnir sluppu at taka lutirnar við sær til USA, tí teir skuldu kannast og umvælast har. Leiðslan á Yale hevur leingi mutað ímóti, men hevur nú valt at slaka.

### Stevnir Guði

Amerikanski politikarin Ernie Chambers heldur, at USA hevur havt í so nógvar náttúruvanlukkur, so nú hevur hann gjørt av at leggja sak ímóti Guði, sum eftir hansara tykki er tann seki. Ernie Chambers, sum er 70 ára gamal og svartur, er limur í amerikanska Senatinum, og tað hevur hann verið líka síðani 1970. Hann er valdur í statinum Nebraska øll árini, og nú skal dómsvaldið har so taka støðu til ta heldur óvanligu stevningina, skrivar AP.